# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Gallaveitslan fyllir runt

**11. apríl verður gallaveitslan í hondbólti. Hesa ferð er talan um tí tíggjundu av slagnum, og tað vilja fyrireikararnir markera**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var H71, sum á sinni tók stig til at skipa fyri einum gallakvøldið fyri hondbóltin. At byrja við skiftust ymsu feløgini um at skipa fyri veitsluni, men seinastu fýra árini hevur tað verið hondbóltsdómarafelagið, sum hevur staðið fyri kvøldinum.

Og illa ber til at siga annað, enn at undirtøkan hevur verið góð. Somikið góð, at avgerð í fjør varð tikin um at flyta tiltakið niðan í Ítróttarhøllina á Hálsi í Havn, tí karmarnir í HB-húsinum, har veitslan varð hildin trý ár á rað, vóru ov lítlir.



*Lagið var av tí besta, tá gallaveitslan í fjør flutti niðan í Ítróttarhøllina á Hálsi*

## Allir vinnarar sleppa við

Nú talan er um 10. Veitsluna, ætla fyrireikararnir at gera eyka nógv burturúr, verður sagt í innbjóðingini, sum er send runt til feløgini. Og eitt nú hava teir eisini boðið øllum vinnarunum av ymsu heiðurslønunum við í veitsluna.

Umframt at reypa og trætast um júst lidna hondbóltsárið er hetta eisini kvøldið, har bestu spælararnir á árinum verða kosnir. Atkvøðuseðlarnir til hetta eru sendir út til feløgini. Soleiðis verða tað spælarar og venjarar, ið gera av, hvør vinnur ymsu heiðurslønirnar. Ikki minst heitið sum ársins hondbóltsspælari. Tað heiti vunnu Finnur Hansson og Ninna K. Johansen í fjør.

Sum vant, so verður talan eisini um dans eftir tiltakið, og er tað nærum fastur siður, at tað er Spaðar 5, sum stendur fyri hesum. Borð- og undirhaldinum standa Jákup Veyhe og Kim Hansen fyri.

# Venjararnir venja

**Hendan vikan er ein av teimum, tá komandi A-venjararnir hava fleiri undirvísingardagar. Eisini leygardagin, tá Morten Olsen kemur at vitja**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

*Við hvørt er eisini neyðugt hjá venjarunum at lurta*
*Mynd: www.football.fo*



10 av føroysku fótbóltsvenjarunum nema sær í løtuni A-venjaraútbúgvingina.

Áður hava venjararnir verið saman eitt vikuskifti, men hendan vikan er mest sum øll sett av til útbúgvingina.

Evni fyri undirvísingina hesa vikuna er kropslig venjing, og er tað Magni Mohr, ið stendur fyri undirvísingini.

Á heimasíðuni hjá FSF sigur Virgar Hvidbro, útbúgvingarsamskipari hjá FSF, at størri dentur verður lagdur á kropsliga venjing á hesum skeiðinum, og tí hava fleiri av teimum, sum frammanundan hava tikið A-venjaraprógv eisini tikið av tilboðnum frá FSF um at vera við til undirvísingina hjá Magna Mohr hesa vikuna.

Fríggjadagin skulu venjararnir lata fyrstu skrivligu royndina undir hesi útbúgvingini, og leygardagin verður aftur venjing og undirvísing í Gundadali.

Tað eru tveir kendir venjarar frá Dansk Boldspil Union, sum koma til Føroya at standa fyri undirvísingini leygardagin, nevniliga danski A-landsliðsvenjarin Morten Olsen og fyrrverandi superligavenjarin Peter Rudbæk, sum fyrr hevur hildið skeið í Føroyum.

Peter Rudbæk fer at greiða føroysku venjarunum nærri frá sokallaðu provenjaraútbúgvingini, sum er ein yvirbygningur til A-venjaraprógvið, meðan danski landsliðsvenjarin fer at greiða nærri frá um spælistíl.

## FAKTA

**Venjarar, sum løtuni taka A-venjaraútbúgvingina**

Hegga Samuelsen, 07Vestur
Allan Dybczak, B36
Alexander Djordjevic, KÍ
Ábraham Løkin, U19
Meinhardt Dalbúð, NSÍ
John Petersen, Skála
Sigfríður Clementsen, EB/Streymur
Anton Skoradal, Víkingur
Áki Johansen, HB
Rúni Nolsøe, HB